# Gongur væl hjá Rock



*Annar lemmurin hjá Rock í Vági kallast Supershark …*



*… hin Sea-Bat*

**Tað gongur betri hjá S/pf Rock í Vági, enn stovnararnir tordu at droyma um. Rock í Vági framleiðir trollemmar**

**TROLLEMMAR**
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Fyritøkan byrjaði virksemi sítt í 2004, og fyrsta roknskaparár var sera gott. Virksemið tá var mest umvælingar av trollemmum.

Stígur kom í fyrst í 2006, men tað endaði væl, tí Rock kom á marknaðin við tveimum nýggjum sniðum av trollemmum.

### Eksploderaði

- Sancy og Enniberg fingu hvør sítt sett av lemmum at royna við, og Enniberg gjørdi mettúr, sigur Hans Joensen, stjóri í S/pf Rock.

- So eksploderaði, og síðani hava vit sent lemmar til Íslands og fleiri til Noregs og eitt franskt skip kemur í næstum eftir lemmum, umframt at t.d. Sundaberg, Skálaberg, Sjagaklettur, Suðringur, Roc Amadour, Vesturvón og Skálafossur hava lemmar frá Rock, greiðir Hans Joensen frá.

Hann fegnast um, at rættilig ferð er á framleiðsluni, og 10 sett hevur Rock niðurfyri at framleiða og tað merkir støðugt arbeiði fram til Jóansøku.

### Tvey nýggj snið

- Tað hevur gingið betri, enn vit tordu at droyma um, tá vit komu við sniðunum Super Shark, sum er til botntrol, og SeaBat, ið er til flótitrol, sigur Hans Joensen.

- Vit fáa bara góðar afturmeldingar frá skipunum, ið hava fingið lemmarnar, sigur Hans, sum nú fegnast um, at t. d. norski báturin Havstrand í vikuni var á Vági eftir lemmum og at Finnur Fríði, sum eisini hevur lemmar frá Rock, hevur meldað aftur, at royndirnar eru sera góðar.

### Ljós framtíð

Í løtuni arbeiða 12 mans hjá S/pf Rock í Vági og 3 lærlingar eru í skúla í Havn, men hava eitt ár eftir av lærutíðini, tá teir koma aftur av skúlanum í summar.

- Men vit hava nóg mikið at gera og kundu brúkt einar 3 – 4 sveisarar afturat, sigur Hans Joensen.

Hans sigur, at í løtuni leigar Rock framleiðsluhøllina frá Eik, men tá ymisk viðurskifti koma á pláss, er ætlanin at keypa høllina og at byggja út, so virkið fær skrivstovubygning og brúsur og tílíkt til arbeiðsfólkini.

- Vit hava gjørt íløgur í skip og útgerð og í lastbil, sum varð goldin eftir einum ári, sigur Hans Joensen, vanliga nevndur Hans í Líðini, sum fegnast um at standa á odda í S/pf Rock, sum stevnir við fullari ferð frameftir.




Góðskutryggjaðar breiðbandsloysnir frá okkum geva tær lættari samband við tíni kæru og virknari framleiðslu.

Vit veita nú breiðbandstelefoni til skip:
- føroysk nummur til manningina
- avrokning av hvørjum nummari sær
- somu lágu samrøðuprísir sum vanligt fastnetstelefoni
- ókeypis samrøður til reiðaríið og aðrar breiðbandskundar hjá okkum

Føroya Tele veitir heildarloysnina!

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum...

petur & petur • 320870